# Lóg

# fyri

# Pensionistafelagið í Havn

( samtykt á aðalfundi tann 25. oktober 2017 )

## § 1 Navn felagsins

Navn felagsins er Pensionistafelagið í Havn og er stovnað 20. mai 1976 sum eitt felag, ið er óheft av partapolitikki og átrúnaði. Pensionistafelagið í Havn er limur í Landsfelag Pensjónista.

## § 2 Endamál

Endamál felagsins er at verja áhugamálini hjá pensionistum umframt at aktivera limirnar við fundum og øðrum, har skipað verður fyri ítrivi og ymsum mentunarligum tiltøkum til gaman og álvara.

## § 3 Limir

Limir í felagnum kunnu allir persónar gerast, sum taka undir við endamáli felagsins. Persónar, sum ynskja at gerast limir, kunnu venda sær til formann ella kassameistara felagsins um limaskap. Einans limir, ið eru 55 ár ella eldri og eru limir í Pensionistafelagnum, kunnu stilla upp til nevndarval í landsfelagnum.

## § 4 Nevnd

Felagið verður stýrt av eini 5-mannanevnd, sum vald verður á aðalfundi felagsins soleiðis sum tilskilað í § 11.
Afturat nevndini verða 3 varalimir sum verða valdir á aðalfundi felagsins soleiðis sum tilskilsð í § 11.
Uppskot til nevndarlimir og varalimir skulu vera játtað av valevnunum og vera felagnum í hendi 7 dagar fyri aðalfundin. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni. Formaðurin umboðar felagið úteftir nevndarinnar vegna. Berst formanninum frá, tekur næstformaðurin við. Nevndarfundur er viðtøkuførur, tá 3 limir eru møttir.
Á fundi ræður vanligur meiriluti. Stendur á jøvnum, verður málið útsett. Nevndin kann seta bólkar ella persónar, ið sjálvir taka sær møgulig hjálparfólk, til at taka sær av ávísum uppgávum.

## § 5 Fundarvirksemi

Felagið hevur fundir sínar frá fyrst í septembur til endan av mai eina ferð um vikuna. Formaður felagsins stýrir hesar fundir.

## § 6 Gerðabók

Allir nevndarfundir og aðrir fundir verða førdir í gerðabók. Um formaðurin ikki fær røkt hetta arbeiði, kann nevndin velja ein skrivara. Honum nýtist ikki at vera limur í nevndini. Skrivarin hevur tá eisini brævaskifti felagsins um hendi og syrgir fyri lýsingum um fundir, alt undir formansins eftirliti.

## § 7 Limagjald

Limagjaldið verður ásett á ársaðalfundi felagsins. Limagjaldið verður kravt einaferð um árið, eftir ársaðalfundin. Limir, íð ikki hava goldið limagjald í longri tíð, kunnu verða strikaðir.

## § 8 Fíggjarstuðlandi tiltøk

Fyri at stuðla undir felagið fíggjarliga verður skipað fyri bingospæli, tombola,, lutaseðlasølu og pakkauppboðssølu og øðrum, har limirnir kunnu taka gestir við.

## § 9 Kassameistarin

Nevndin velur ein kassameistara. Hesin førir roknskap yvir allar inntøkur og útreiðslur felagsins, eins og hann syrgir fyri innkrevjing av limagjaldi. Nevndin kann geva kassameistaranum bankafulltrú at avgreiða allar rokningar til tann dagliga rakstur felagsins. Eru tað serlig viðurskifti, eigur hann at fáa formansins góðkenning. Nevndin kann seta ein bókhaldara at taka sær av bókhaldi og roknskapi.

## § 10 Avlopspeningur

Allur avlopspeningur felagsins verður at seta inn á bankabók.

## § 11 Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins verður hildin í seinnu helvt av oktober, og skal vera lýstur 14 dagar frammanundan.

Aðalfundurin fer soleiðis fram:

1. Val av orðstýrara og fundarskrivara.
2. Formaðurin greiður frá virkið felagsins farna ári.
3. Kassameistarin leggur fram grannskoðaðan roknskap fyri farna árið, sum er frá 1. september til 31. august.
4. Val av nevnd. Annaðhvørt ár standa 3 nevndarlimir fyri vali og annaðhvørt ár 2 nevndarlimir.
5. Val av trimum varanevndarlimum fyri eitt ár í senn.
6. Val av grannskoðara við tiltaksgrannskoðara.
7. Áseting av limagjaldi.
8. Innkomin mál.
9. Ymist.

Uppskot frá limum til nevndarval skulu vera játtað av valevninum og vera felagnum í hendi 7 dagar fyri aðalfundin. Mál sum limirnir ynskja viðgjørd á aðalfundi, mugu vera formanninum í hendi í seinasta lagi 7 dagar áðrenn aðalfundin. Ársaðalfunduri er altíð viðtøkuførur, tá hann er lógliga lýstur.

## § 12 Eykaaðalfundur

Eykaaðalfundur kann verða hildin, um mál stinga seg upp, sum nevndin heldur hava serligan týdning ella áhuga, ella í minsta lagi 25 limir skrivliga venda sær til nevndina við áheitan um slíkan fund.
Fundurin verður lýstur við somu ávaring sum aðalfundur.

## § 13 Serlig tiltøk

Eitt av tiltøkum felagsins er at skipa fyri útferðum bæði innan- og uttanlands. Nevndin kann áseta eitt fast gjald fyri hvønn av limunum, ið koma við og kann veita tilskot til ferðina, alt eftir, hvussu fíggjarliga støða felagsins er.
Til uttanlands ferð verður kravt depositum, um limur meldar frá, fær hann ikki depositum afturgoldið.

## § 14 Veitslur

Felagið skipar fyri jólaborðhaldi fyri limum sínum um miðjan desembur. Annars markerar felagið við veitslu ella tí, ið víkir frá vanligum fundum, tá høvi býðst.

## § 15 Avtøka

Felagið kann ikki takast av uttan á eykaaðalfundi, ið annars hevur hetta mál á skránni. Slíkur eykaaðalfundur skal lýsast við somu ávaring sum ársaðalfundur, og skulu í minsta lagi 2/3 av limum felagsins verða møttir og 75% av teimum møttu atkvøða fyri, at felagið verður avtikið.

## § 16 Ognir, um avtøka verður

Eigur felagið, tá ið tað verður avtikið, ognir, verða tær latnar Landsfelag Pensjónista.